# 79 bátar tilmeldaðir FM-róðrinum í summar

Áhugin fyri at rógva kapp tykist ikki at verða minkandi. Nú freistin at boða frá luttøku í fm-róðrinum í summar er úti, hava ikki færri enn 79 bátsmanningar boðað frá, at tær verða við. 5-mannaførini eru 19 í tali, bæði hjá gentum og dreingjum. 15 bátar eru tilmeldaðir kappingina hjá 6-mannaførum við monnum, og 10 bátar eru við í kappingini hjá 6-mannaførum við kvinnum. Áttamannaførini eru átta í tali, og eisini hjá 10-mannaførunum er talið av luttakandi bátum átta.

*tn*



**5 - mannafør dreingir**

Báran
Beinta
Blikur
Drekin
Fípan Fagra
Firvaldur
Frúgvin
Havfrúgvin
Hvassi
Junkarin
Kollur
Royndin Fríða
Sílið
Spógvin
Svanur
Súlan
Tekla
Tjaldrið
Ørnin

**19 bátar íalt**

**5 - mannafør gentir**

Beinta
Blikur
Drekin
Dúgvan
Falkur
Fípan Fagra
Firvaldur
Frúgvin
Havfrúgvin
Hvassi
Junkarin
Kollur
Royndin Fríða
Sílið
Spógvin
Svanur
Tekla
Tjaldrið
Ørnin

**19 bátar íalt**

**6 -mannafør menn**

Fortuna
Gongurólvur
Hósvíkingur
Hvessingur
Jarnbardur
Kollfirðingur
Lómur
Páll Fangi
Riddarin
Smyril
Sólmundur
Stjørnan
Strálan
Sundabáturin
Víkingur

**15 bátar íalt**

**6 - mannafør kvinnur**

Fortuna
Gongurólvur
Jarnbardur
Lómur
Páll Fangi
Riddarin
Smiril
Sólmundur
Sundabáturin
Víkingur

**10 bátar íalt**

**8 - mannafør**

Argjabáturin
Knørrur
Kvívíkingur
Miðvingur
Nevið Reyða
Sandavágsbáturin
Toftabáturin
Ørvur

**8 bátar íalt**

**10 - mannafør**

Eysturoyingur
Havnarbáturin
Hoyvíkingur
Nólsoyingur
Ormurin Langi
Skálabáturin
Vágbingur
Vestmenningur

**8 bátar íalt**

Tilsamans eru 79 bátar tilmeldaðir til FM-róðrarnar í summar

Við róðrarkvøðu
Róðrarsamband Føroya

# Ólavur vann trygt

**Ratingfavoritturin úr Klaksvík vann við fullari úrtøku tí triðju vikuskiftiskappingina í vár.**

**Havnar Telvingarfelag hevur skipað fyri kappingunum í vár og í juni verður stór HT-open**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Nakað er síðani, at føroyski elitutelvarin Ólavur Simonsen hevur roynt seg á 64 puntunum. Tað lá ikki fyri hjá honum at luttaka í FM fyri einstaklingar á Toftum á páskum. Ólavur hevði annars luttikið á hvørjum ári síðani 1990. Seinastu ferð klaksvíkingurin telvaði var tískil í seinasta umfarinum í liðkappingini í februar, tá lið hansara gjørdist føroyameistarar.

## Byrjanartrupulleikar

Ólavur var greiður favorittur í vikuskiftiskappingini við nærum 200 ratingstigum fleiri enn Rani Nolsøe, sum var komin úr Klaksvík fyri at reinsa heldur soltna úrslitið á Toftum av sær. Tað gekk tó ikki eftir ánni hjá klaksvíksveterananum.

Unglingurin Sjúrður Thorsteinsson telvaði manniliga móti Ólavi í fyrsta umfarinum. Eftir ivasamt byrjanarspæl, fekk tvøroyamaðurin leikt seg innaftur í talvið. Men í avgerandi løtuni var hann óneyvur og Ólavur háladi loksins stigið inn. Eitt spennandi talv, sum er við í blaðnum í dag.

Sjúrður og Rani Baldursson eru báðir undirrataðir. Teir eru væl sterkari enn hvat teirra umleið 1600 ratingtal sigur okkum. Tí varð tað heldur ikki óvæntað, at báðir fingu javnt móti Rana Nolsøe.

Hevði Ólavur trupulleikar í fyrsta umfarinum, lá væl betur fyri hjá honum í restini av kappingini. Ólavur vann nevnliga øll síni fimm talv.

## 13 ára gamal og stórmeistari

Tann eftirhondini víðagitni smádrongurin úr Norra, Magnus Carlsen, ognaði sær sín triðja og seinasta stórmeistaranorm í sterku kappingini í Dubai. Martin Poulsen og Hans Kristian luttóku eisini.

Magnus er tann næstyngsti stórmeistari nakrantíð. Hann vann sær trygt normin í Dubai við 6,5 stigum av 9 møguligum og einum deildum øðrum plássi. Martin og Hans Kristian fóru báðir eitt vet uppeftir ratingstiganum við ávíkavist 4,5 og 4 stigum.

Í løtuni telvar Magnus í siðvondu Sigeman-kappingini, sum verður telvað í Svøriki í hesum døgum. Norska talentið hevur tvey stig av fýra møguligum, og liggur á deildum triðja plássi. Donsku topptelvararnir Curt Hansen og Peter Heine Nielsen eru á odda við 3 stigum.

# Talvið hesa vikuna

**Ólavur Simonsen (2231) — Sjúrður Torsteinsson (1613)**

HT-VIKUSKIFTISKAPPING (1. UMFAR), 31.04.2004

1.e4 d6 2.d4 Rif6 3.Ric3 g6 4.f3 Ribd7 5.Be3 c6 6.Fd2 b5 7.d5 cxd5 8.Rixd5 a6 9.c4 (Góður leikur fyri at vikna um svørtu støðuna frúgvamegin) 9...Rb8 10.cxb5 Rixd5 11.Fxd5 axb5 12.Bd4 (Sjálvandi ikki 12.Bxb5?? orsakað av Fa5+) 12...e5 13.Be3 Fa5+ 14.Bd2 Fb6 15.a4 Ric5? (Ba6 var einasti rætti leikur) 16.Bxb5+ Bd7 17.b4! Rie6 18.Bxd7+ Kxd7 19.Rie2 (Og hvítur hevur greiðan fyrimun. Sjúrður stríðist tó væl og útnyttar seinni í talvinum feilirnar hjá Ólavi, fyri at vinna seg inn í talvið aftur) 19...Be7 20.Rc1 f5 21.a5 Fb7 22.Fd3 fxe4 23.fxe4 Rhf8 24.Rf1 Bg5 25.Rc4?! (Rxf8 gevur betri spæl) 25...Bxd2+ 26.Fxd2 Rxf1+ 27.Kxf1 Rf8+ (Svartur hevur gott spæl fyri mistu finnuna) 28.Ke1 Fa7 29.Fd3 Ff2+ 30.Kd2 Fxg2 (Støðan er jøvn, metur telduforritið Fritz 7. Men eftir næstu leikirnir hjá báðum pørtum, fær svartur fyrimun) 31.Rc3 (Fg3 betur) 31...Rid4 32.Fh3+ Fxh3 33.Rxh3 Støðumynd (Áhugaverd støða. Hvat er rætti leikur hjá svørtum?)



33...Rif3+? (Rf2 gevur góðan fyrimun. T.d. 33...Rf2 Re3 34.Rxh2) 34.Kc3 Rig5 Sjúrður bleiv ov varin og passivur og tað er júst tað ein ikki skal vera í slíkum støðum) 35.Re3 Kc6 36.Kc4 Rb8 37.Ric3 Rie6 38.b5+ (Støðan er vunnin, og hesaferð letur Ólavur ikki Sjúrður fáa nakran mótkjans) 38...Kd7 39.Rh3 h5 40.Rf3 Rif4 41.Kb4 g5 42.a6 g4 43.Re3 Rie6 44.Ka5 Ric5 45.Rid5 Ra8 (støðan var tapt kortini) 46.Rib6+ 1—0

Hestprent gevur pappírinum betri flog

HESTPRENT

Lesið internet Sosialurin !


## Bátur til sølu



Súðubygdur Tresfjord-bátur, 25 fót stórur, til sølu við ongum fiskiloyvi.

Prísuppskot: 45.000 kr.

**Ringið 448120/250795**



## Mjólkarvirkið søkir eftir fólkum

Mjólkarvirkið søkir eftir tveimum fólkum, einum meiaristnæmingi og einum frítíðaravloysara.

Mjólkarvirkið framleiðir umleið 7.500 tons av mjólk og mjólkarúrdráttum árliga, og er hetta eitt sera virkið og spennandi arbeiðspláss.

**Meiaristnæmingur**
Meiaristnæmingurin hevur eina lærutíð uppá 3 ár, og er skúlagongdin í Danmørk, 5 ferðir í tíðarskeiðinum, í tilsamans 50 vikur.

Eftir lokna útbúgving er møguleiki at útbúgva seg enn meira, til eitt nú meieríteknikara, procesteknolog ella meieríingeniør.

Løn samb. sáttmálanum við Handverkarafelagið, og er skúlagongdin í Danmørk ókeypis.

**Frítíðaravloysari**
Til framleiðsluna/goymsluna søkja vit eftir einum dugnaligum og álítandi fólki til alt vanligt pakki og goymsluarbeiði .

Løn samb. sáttmála við arbeiðarafelag.

Áhugaði kunnu senda umsókn saman við møguligum viðmælum til:

*Meginfelag Búnaðarmanna*
*Búnaðardepilin*
*FO-410 Kollafjørður*

*Merkt: Umsókn*

Umsóknarfreistin er 15. mai 2004.

MBM
MEGINFELAG BÚNAÐARMANNA

Sosialurin



## Góðir brúktir bilar

**Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000, fyrr 72.000,- **nú 69.000,-**

**Saab 9-3 TiD 2.2** svartur, árg. 2001, 5 hurðar, km. 35.000 **195.000,-**

**Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000, fyrr 67.000,- **59.000,-**

**Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000, fyrr 155.000,- **nú 129.000,-**

**Peugeot Boxer 2.8 HDi 330 MH Van** hvítur, árg 2002, 4 hurðar **v/mvg 160.000,-**

**Seat Cordoba 1.9 D Station Car** gráur, árg 2000, 5 hurðar. km. 38.000, fyrr 109.000,- **nú 99.000,-**

**Opel Astra 1.6 16V** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km. 52.000, fyrr 112.000,- **nú 99.000,-**

**BMW 3 Serie** grønur, árg 1987, 4 hurðar, km. 120.000 **33.000,-**

**Opel Vectra 1.7 DT** reyður, árg. 1996, 4 hurðar, km. 195.000 **69.000,-**

**Ford Escort** bláur, árg 1996, 4 hurðar, km. 54.000 **59.000,-**

**Opel Vectra 2.0 DT Station Car** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000, *sýn 24/03/04* **95.000,-**

**Ford Focus 1.6 Ghia** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 29.000, *nýsýnaður* **109.000,-**

**Opel Corsa 1.2** grønur, árg. 2002 5 hurðar, km. 31.000 **v/mvg 99.000,-**

**Toyota Corolla 1.6** vínreyður, árg 1989, km. 152.000 **18.000,-**

**Opel Corsa 1.2** bláur, árg. 2002 3 hurðar, km. 35.000 **v/mvg 85.000,-**

**Citroen Xantia 2.0 Hdi SC** grønur, árg 2000, km. 110.000, *sýnaður: 19/03/04,* fyrr 148.000,- **nú 119.000,-**

**Opel Corsa Combo Van D** bláur, árg. 2002, 4 hurðar, km. 16.000 **v/mvg 112.000,-**

**Hyundai H100 Vøruvogn. Diesel** grønur, árg 1996, 4 hurðar, km 123.000 **59.000,-**

**Hyundai Accent 1.5 AirCon** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km 92.000 **89.000,-**

Sosialurin 341800

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61



## Ársaðalfundurin

**hjá »Føroya Pro Vita« verður leygardagin 15. mai kl. 14.00 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.**

Norski presturin Ludvig Nessa verður gestarøðari.
Evni: »Stríðist fyri ófødda barninum«.

Kl. 15.00: Drekkamunnur.
Kl. 15.20: Skrá samb. lógum felagsins.

**v/ Føroya Pro Vita**
Ólavur í Mittúni, form.



## 4 mannafar til sølu



Við føstum 6 HK Yamar motori v/smábreki.

Til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tel. 262 165**



## Skúlastýrisval

## Fuglafjarðar skúli

Vallistin til skúlastýrisvalið tann 25. mai 2004 liggur frammi á skrivstovuni í skúlanum.

Fólk, sum ikki eru komin á vallistan, og sum hava valrætt og valbæri, skulu venda sær til skúlan **í seinasta lagi 18. mai** við undirskrivaðari váttan fyri at koma á vallistan.

**Uppstillingarfundur** verður í fimleikahøll skúlans **mánakvøldið 10. mai kl. 19.00.**

**Valnevndin f. Fuglafjarðar skúla**



## Frá Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag

Lýsti ársaðalfundurin verður fríggjakvøldið 7. mai kl. 20.00 í "Virkinum" á Sandi

Umboð flokksins í landsins leiðslu verða við.

Eisini verður kaffi og burturluting.

***Nevndin***

www.javnadarflokkurin.fo





## Motorsúkkla til sølu

Suzuki intruder 750 ccm
Árgangur: 1986
Prísur: kr. 60.000,-

**Tlf. 225 641**


Spurnarkapping á amnesty.fo